# Heilsumálaráðið

Dagfesting: 24. mai 2023
Mál nr.: 21/22828-23
Málsviðgjørt: AS
Ummælistíð: Skrivið frá/til
Eftirkannað: Lógartænastan dagfestir

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**krabbameinsskrá og um at fráboða krabbameinssjúku o.a. í skránni**

Við heimild í § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2022 um Fólkaheilsustýrið verður ásett:

**§ 1.** Fólkaheilsustýrið skipar, umsitur og mennur Krabbameinsskráseting Føroya.

**§ 2.** Læknar hava skyldu at boða frá til krabbameinsskránna navn, P-tal og bústað hjá sjúklinginum, fyrsta læknaliga samband, diagnosu sambært skjali 1, slag av viðgerð og aðrar upplýsingar. Pkt. 1 er ikki galdandi um upplýsingarnar ikki kunnu fáast til vega.
*Stk. 2.* Vegleiðing sambært stk. 1 er á heimasíðuni hjá Fólkaheilsustýrinum.
*Stk. 3.* Læknar hava skyldu at boða frá í krabbameinsskránni, hóast teir møguliga eisini skulu boða frá í øðrum skráum.

**§ 3.** Læknar hava skyldu at boða frá í sambandi við:
1) Allar nýggjar diagnosur av krabbameinssjúku o.ø.
2) Tilburðir av fleiri krabbameinssjúkum hjá sama persóni. Hvør krabbameinstilburður skal fráboðast serskilt, um hann er at skilja sum ein nýggjur primerur krabbameinstilburður.
3) Endurskoðan av diagnosu frá fyrr av, ið var fevnd av fráboðanarskylduni.
4) Staðfesting av, at krabbameinssjúka, ið fyrr hevur verið fráboðað, ikki hevur verið til staðar.
5) Progressión av prækankrøsum broytingum ella carcinoma in situ, undir hesum skifti til innvasivt krabbamein.

**§ 4.** Læknar, ið hava skyldu at boða frá, eru:
1) Serlæknar í almennum medisini, ið av fyrstan tíð diagnostisera, viðgera ella hava eftirlit við fráboðanarskyldugum tilburðum uttan ávísing og eftirfylgjandi kontakt við sjúkrahús ella privatstarvandi serlækna.
2) Privatstarvandi serlæknar, ið av fyrstan tíð diagnostisera, viðgera

ella hava eftirlit við fráboðanarskyldugum tilburðum uttan ávísing og eftirfylgjandi kontakt við sjúkrahús.

3) Ábyrgdarhavandi lækni fyri sjúklingaviðgerðini í privatari klinikk, ið av fyrstan tíð diagnostiserar, viðger ella hevur eftirlit við fráboðanarskyldugum tilburðum, uttan mun til um tilburðurin fyrr er fráboðaður.
4) Ábyrgdarhavandi yvirlækni á sjúkrahúsdeild, ið av fyrstan tíð diagnostiserar, hevur eftirlit við ella viðger kliniskar og/ella mikroskopiskar fráboðanarskyldigar sjúklingatilburðir, uttan mun til um tilburðurin fyrr er fráboðaður. Tó skal ikki fráboðast á onkologiskari ella radiologiskari deild, tá sjúklingurin hevur verið ella verður fráboðaður av kliniskari deild.
5) Útinnandi yvirlækni á sjúkrahúsdeildum, tá líkkanningin vísir ein skrásetingarskyldigan krabbameinstilburð, ið ikki fyrr er kendur og fráboðaður av klinisku sjúkrahúsdeildini.

**§ 5.** Fólkaheilsustýrið kann í sambandi við eftirlit við, um fráboðanir og upplýsingar, sambært § 2, stk. 1 og § 3 eru rættar, viðgera:

1. Upplýsingar sambært § 2, stk. 1 og § 3.
2. Upplýsingar frá THS, t.e. talgildu heilsuskipanini.
3. Skrá um patologisvar hjá føroyskum sjúklingum.
4. Skrá um deyðsorsakir frá Landslæknanum.
5. Heilsuskráir frá donskum myndugleikum.

**§ 6.** Diagnosur og diagnosunummur sambært skjali 1 svara til galdandi donsku útgávuna av sjúkuflokkanarskipanini ICD, t.e. International Classification of Diseases. Verður hendan broytt kann Fólkaheilsustýrið gera samsvarandi broytingar í skjali 1.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, 24. mai 2023

**Margit Stórá**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Skjal 1**

**Fráboðanarskyldigar krabbameinssjúkur o.a.**

| | |
|---|---|
| DB21* | HIV- sygdom med neoplastisk sygdom |
| DC00*-DC14* | Kræft i læbe, mundhule og svælg |
| DC15*-DC26* | Kræft i mave-tarmkanal |
| DC30*-DC39* | Kræft i åndedrætsorganer og organer i brysthule |
| DC40*-DC41* | Kræft i knogle og ledbrusk |
| DC43*-DC44* | Ondartet melanom og anden hudkræft |
| DC45*-DC49* | Kræft i mesotel og bindevæv |
| DC50* | Kræft i bryst |
| DC51*-DC58* | Kræft i kvindelige kønsorganer |
| DC60*-DC63* | Kræft i mandlige kønsorganer |
| DC64*-DC68* | Kræft i urinveje |
| DC69*-DC72* | Kræft i øje, hjerne og andre dele af centralnervesystemet |
| DC73*-DC75* | Kræft i skjoldbruskkirtel og andre endokrine kirtler |
| DC76*-DC80* | Kræft med dårligt definerede, eller ikke specificerede lokalisationer |
| DC81*-DC96* | Kræft i lymfatisk og bloddannede væv |
| DD05* | Carcinoma in situ i bryst |
| DD06* | Carcinoma in situ i livmoderhals |
| DD09. 0 | Carcinoma in situ vesicae urinariae |
| DD09. 1* | Carcinoma in situ i andre og ikke specificerede urinorganer |
| DD095 | Non-invasiv papillær tumor (Ta) i urinblæren |
| DD096* | Non-invasiv papillær tumor (Ta) i anden/ikke specifik lokalisation i urinveje |
| DD301-DD309 | Godartet tumor i urinveje (ekskl. godartet nyretumor) |
| DD32* | Godartet tumor i hjernehinder |
| DD33* | Godartet tumor i hjerne og andre dele af centralnervesystemet |
| DD35. 2 | Neoplasma benignum glandulae pituitariae |
| DD35. 3 | Neoplasma benignum ductus craniopharyngei |
| DD35. 4 | Neoplasma benignum corporis pinealis |
| DD37*-DD48* | Tumorer af usikker eller ukendt karakter |
| DN871 – DN879 | Celleforandring i slimhinde på livmoderhals (dysplasi) |
| DO01* | Mola vandblære |

*) Ásetur allar diagnosur í bólkinum